52-099/2020

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 99/2020 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Djóna Nolsøe Joensen, løgtingsmanni, um viðurskiftini hjá fangum

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvørji ítøkilig sálarheilsutilboð standa fólki í boði eftir leyslating úr eini varðhaldsfongsling?

2. Hvussu vil løgmaður tryggja, at fangar, ið verða sendir til Danmarkar at sita dóm ella í varðhaldi, fáa sama rætt til telefoniskt samband við avvarðandi, sum hesi høvdu fingið, sótu tey í Føroyum?

Svar til 1 og 2:

Tá ið Kriminalforsorgin er á donskum hondum, havi eg sent fyrispurningin til viðmerkingar hjá Ríkismyndugleikunum. Justitsministeriet hevur svarað fyrispurninginum í hjálagda skrivi dagfest 22. mars 2021.

Eg kann leggja afturat, at Heilsumálaráðið í skrivi 17. mars 2021 hevur boðað frá, at heilsuverkið – herundir Psykiatriski Depil – ikki er partur av nøkrum tilboði, har tað verður veitt ítøkilig sálarheilsutilboð til fólk, eftir at tey eru leyslatin úr eini varðhaldsfongsling.

Sum tað ber til at lesa í svarinum frá løgmálaráðharranum, so er settur ein arbeiðsbólkur við donskum og føroyskum embætisfólki, sum skulu gera ein frágreiðing um, hvussu fongsulsviðurskiftini í Føroyum kunnu betrast. Arbeiðsbólkurin skal millum annað hyggja nærri at møguleikunum fyri at betra um hølisviðurskiftini, men eisini viðgera, hvussu eitt nú undirvísing, betri arbeiðsmøguleikar og rúsevnisviðgerð skulu skipast í einum føroyskum fongsli.

Arbeiðsbólkurin skal vera liðugur við arbeiðið áðrenn summarfrítíðina.

Í Tinganesi, 23. mars 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · lms@lms.fo · www.lms.fo